# Oddagrein

**Eirikur Lindenskov**
*eirikur@sosialurin.fo*



# KIRKJAN FYRI ØLL

Fráskild verða framvegis vígd í Christianskirkjuni í Klaksvík.

Hesum boðskapi kom Magnus Brahé Jørgensen, sóknarprestur í Klaksvík, við fyrr í vikuni. Ein løgin boðskapur frá einum presti, kundu vit sagt. Men her var kortini talan um ein prest, sum vildi sannføra síni sóknarbørn um, at fráskild veruliga eru vælkomin til gudstænastu hjá honum - og at hann fegin vil víga tey. Orsøkin til boðskapin var, at tað í sendingini »Skannarin« hjá Kringvarpinum, har sjóneykan varð sett á prestar, sum ikki vilja víga fráskild, kom fram, at ein fráskild kona í Klaksvík mátti úr býnum at finna sær náði hjá einum presti, sum vildi gifta hana.

Hin føroyska Fólkakirkjan hevur góða undirtøku í fólkinum, og tað er at fegnast um. Men hon hevur nøkur lýti. Eitt teirra er, at tað eru prestar, sum sleppa at hátta sær soleiðis, at teir beinleiðis særa ávís sóknarbørn við at taka rættiliga grundleggjandi rættindi frá teimum. Boðskapurin til hesi fólk verður púra greiður: Tá prestur ikki virðir teg so frægt, at hann vil víga teg, so kanst tú heldur ikki kenna teg vælkomnan í kirkju hjá hesum presti.

Hetta er ein ørkymlandi støða. Samfelagið loyvir hjúnaskilnaði – og tað ger Fólkakirkjan eisini. Fólkakirkjan góðtekur eisini, at prestar skiljast og giftast uppaftur. Hví kann Fólkakirkjan so ikki seta upp greiðar reglur fyri hesi viðurskifti? Hví skal Fólkakirkjan í summum førum rekast sum ein stovnur hjá ávísum privatpersónum? Tað eru so nógv viðurskifti, sum vit øll í okkara privatu størvum kunnu halda hetta ella hatta um. Vit kunnu hava samvitskubit – men tað eru summar uppgávur, sum skulu loysast.

Signalið, sum kirkjan sendir við at lata prestar sjálvar gera hesi viðurskifti av er, at øll eru ikki líka vælkomin – ella at øll sóknarbørn ikki eru góð nokk. Tað kann als ikki góðtakast, at summi mugu leita sær í aðra kirkjusókn, tí teirra prestur hevur sín egna máta at gera tingini uppá.



**» Í Fólkakirkjuni skulu øll hava sama rætt**

Eitt er, hvat fólk gera í privatum samkomum – men í Fólkakirkjuni skulu øll hava sama rætt – so frægt av skili má vera. Fólksins kirkja eigur at geva øllum sóknarbørnum somu viðferð.

## Løgmaður kemur heim við Norrönu

Kaj Leo Johannesen, løgmaður, sum hevur verið í føðingardegi hjá Margrethu drotning, kemur heim við Norrønu, nú ólag kom á flogferðsluna.

Kaj Leo Johannesen og løgtingsformaðurin Hergeir Nielsen skuldu eftir røttum komið heim við flogfari í morgun, men tá ið loftrúmið framhaldandi er stongt, valdu teir at fáa sær ferðaseðil við Norrönu við fráferð úr Esbjerg leygardagin.

## Reality stjørnur verða heima



Um vikuskiftið skuldu dansistøð í Havn og Klaksvík hava vitjan av reality-stjørnum úr Danmark, men ólagið á flogferðsluni ger, at hesar vitjanir verða av ongum. Í Deep skuldu luttakarar í Paradise Hotel vitjað, og á Rex og í Club 700 í Klaksvík skuldi Sidney Lee leggja leiðina fram. Sidney Lee skuldi eisini verða gestur í Hvonn Live sendingini, sum Rás2 skuldi hava leygarkvøldið. Loftrúmið yvir Danmark er stong fyribils og letur í fyrsta lagi upp í nátt. Vitjaninar hjá donsku reality-fólkunum verða tí av ongum í hesum føri, og eisini Hvonn Live sendingin hjá Rás2 er avlýst.



**» Eg eri illa við av Torbjørn Jacobsen**

JASPUR VANG
KJAK SÍÐA 11



**» Heðin Mortensen steðgaði sjálvur vegagerð**

HEINI EYSTUROY Í KJAKI

## Organistur lagdur undir at gera herverk



*Setanin av nýggjum organisti í Christianskirkjuni er forpurrað av einum sms-boðum*

Setanin av nýggjum organisti í Christianskirkjuni í Klaksvík dregur út, eftir at ein av umsøkjarunum var lagdur undir at hava framt herverk á urgu í Gøtu kirkju. Hetta skrivar lokalblaðið Norðlýsið.

Nýggjur organistur skal setast í Christianskirkjuni eftir Hjørleif Waag Høgnesen, sum røkti uppgávuna í meira enn 40 ár. Norðlýsið skrivar, at minst tveir umsøkjarar eru til starvið, og tað eru báðir hjálparorganistarnir í Christianskirkjuni, Petur Martin Johannesen og Jóhanna Johannesen.

Blaðið skrivar, at herfyri vóru eini sms-boð send, har Petur Martin Johannesen varð lagdur undir at hava framt herverk á urguna í Gøtu kirkju, har hann hevur verið tónleikalærari og kórleiðari. Bæði Petur Martin Johannesen og forkvinnan í Gøtu kirkju avsanna, at Petur Martin hevur nakað sum helst at gera við skaðan, sum varð gjørdur á urguna í Gøtu kirkju, og tey undrast á, at hendan søgan er farin at ganga í Klaksvík.

Formaðurin í kirkjuráðnum í Klaksvík, Øssur Kjølbro, vil ikki gera viðmerkingar til málið. Hann sigur við Norðlýsið, at kirkjuráðið er ikki liðugt at viðgera starvssetanina, og fyribils røkja teir báðir hjálparorganistarnir í felag uppgávuna í Christianskirkjuni.

*eydun@sosialurin.fo*

**Sosialurin** Tel. 341800
www.sosialurin.fo

Stovnaður: 1927
Ábyrgdarblaðstjóri: Eirikur Lindenskov
eirikur@sosialurin.fo
Útgevari: Sp/f Sosialurin

Uppseting: Sosialurin
Prent: Prentmiðstøðin
Avgreiðsla: mán - frí
kl. 08.00 - 16.00

**Marknaðardeild**
lysing@sosialurin.fo
Marknaðarleiðari: Jaspur Langgaard
jaspur@sosialurin.fo

**Tórshavn** Tórsgøta 1, Postboks 76, 100 Tórshavn
tel. 341800, fax 341801, post@sosialurin.fo

**Norðoyggjar** Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687, klaksvik@sosialurin.fo

**Suðuroy** tel. 375364, fax 375464, tel. 228814,
aki@sosialurin.fo, dagfinn@sosialurin.fo

***Haldarar,*** *sum ikki hava fingið blaðið, kunnu ringja tel. 341818 frá kl. 8.00 til 20.00 og boða frá.*